## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og yvirhøvur turt, men seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið ella storm av suðri og regn. Um kvøldið stormur av vestri og útnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann minkar vindin niður í stívt andøvsgul av útnyrðingi, men um kvøldið veksur hann vindin aftur úpp í strúk í vindi av suðri. Væntandi turt og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og ælingur. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin minkar hann vindin niður í lot av útnyrðingi ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin um 4 stig. Týsdagin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og yvirhøvur turt. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Eivør á íslendskari jólafløgu

**Føroyaska songkvinnan, Eivør Pállsdóttir, er ein av sangarinnunum á nýggjari íslendskari jólafløgu, ið kom út í gjár. Fløgan er upptikin í samband við stórar konsertir, ið vórðu hildnar í Íslandi fyrst í desember**

ÚTGÁVA
*Eydna skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*




*Nýggja íslendska jólafløgarn har Eivør Pálsdóttir syngur saman við trimum øðrum diva'um*

Um jólini plagar Eivør at hava fleiri konsertir, og og í ár er einki undantak. Hendan mánaðin hevur hon havt fleiri konsertir í Íslandi, og í tí sambandi er nú komin ein nýggj jólafløga.

Tað er íslendska felagið Frostroses, ið hvørt ár skipar fyri jólakonsert, og samstundis gevur tónleikin út á fløgu.

Í ár vóru tríggjar konsertir hildnar 12. og 13. desember, og tað vóru Eivør Pállsdóttir og kendu íslendsku sangarinnurnar Margret Eir, Heru Bjørk og Disella, ið sungu. Konsertirnar vóru útseldar, og umleið 12.000 fólk sóu og hoyrdu tær fýra syngja jólasangir.

Fløgan er upptikin í studio í Reykjavík, áðrenn konsertirnar, og nú ber so eisini til at fáa fløguna til keyps í Føroyum. Á fløguni eru 14 jólaløg, ið verða sungin av songkvinnunum saman við Kallakór Fóstbræður, íslendska gospelkórinum og øðrum. Meira um Frostroses konsertirnar og fløgunar sæst á www.frostrosir.is

Í kvøld, morgin og ovurmorgin hevur Eivør somuleiðis jólakonsertir í Íslandi. Hesar verða í Langholtskirkjuni í Reykjavík.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -8 |
| Nuuk | -9 |
| Qaqortoq | -7 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 3 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | -1 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 10 |
| Athen | 16 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 960 hPa. norðan fyri Føroyar fer í landnyrðing.



**Í dag:**
Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing og dýpist. Tað gevur storm við Føroyar fríggjakvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/12 kl. 06[00] – 12/12 06[00]. Hitin í gjár: 5,8°
Minsti hiti máldur í desember: -10,5° - Mesti hiti máldur í desember: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 11/12 kl. 06[00] – 12/12 06[00].
Avfallið higartil í desember: 46 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

12. desember Fullmáni/ Mánin næstur jørðini
19. desember Seinna kvarter
26. desember Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. des | 11:11 | 23:47 | 10:11 | 22:47 | 10:26 | 23:02 | 0:48 | 13:11 | 1:48 | 14:11 | 9:26 | 22:02 | 8:26 | 21:02 | 11:26 | - | 0:03 | 12:26 | 10:56 | 23:32 | - | 12:11 |
| 19. des | - | 12:22 | 11:22 | 23:57 | 11:37 | - | 1:47 | 14:22 | 2:47 | 15:22 | 10:37 | 23:12 | 9:37 | 22:12 | 0:02 | 12:37 | 1:02 | 13:37 | - | 12:07 | 0:47 | 13:22 |
| 20. des | 0:57 | 13:32 | - | 12:32 | 0:12 | 12:47 | 2:57 | 15:32 | 3:57 | 16:32 | 11:47 | - | 10:47 | 23:07 | 1:12 | 13:47 | 2:12 | 14:47 | 0:42 | 13:17 | 1:57 | 14:32 |
| 21. des | 1:52 | 14:13 | 0:52 | 13:13 | 1:07 | 13:28 | 3:52 | 16:13 | 4:52 | 17:13 | 0:07 | 12:28 | 11:28 | 23:49 | 2:07 | 14:28 | 3:07 | 15:28 | 1:37 | 13:58 | 2:52 | 15:13 |
| 22. des | 2:34 | 14:56 | 1:34 | 13:56 | 1:49 | 14:11 | 4:34 | 16:56 | 5:34 | 17:56 | 0:49 | 13:11 | - | 12:11 | 2:49 | 15:11 | 3:49 | 16:11 | 2:19 | 14:41 | 3:34 | 15:56 |